J.Nr.: 16/01074
Avgerð.nr.: 7
Dagfesting.: 16.mars 2017

Mál viðvíkjandi borgara undir 67 ár við livrasjúku

Markamótsnevndin hevur móttikið skriv, dagfest 28. februar 2017, frá einari kommunu viðvíkjandi borgara undir 67 ár, ið søkir búpláss á eldrastovni í kommununi.

Kommunan sigur seg hava verið í sambandi við Almannaverkið um málið, og at báðir myndugleikar vóru samdir um at leggja málið fyri Markamótsnevndina.

Myndugleikarnir siga seg ivast í, hvørt Almannaverkið ella kommunan eiga at veita borgaranum búpláss. Biðið verður tí um eina niðurstøðu í mun til markamót 3 í sokallaða Markamótsskjalinum um markamótið millum forsorgarlógina og lógina um heimatænastu og eldrarøkt v.m. (L.l. 19 frá 2014).

Borgarin hevur sokallaða skropnilivur, ið stavar frá eini autoimmunari sjúku.

Av tí at borgarin hevur ólekiliga sjúku, og at hann ikki verður mettur nóg sterkur til eina livratransplantatión, so vil – sum eisini sæst í meting frá lækna – sjúkan alsamt versna, og verandi sjúkueyðkenni og avleiðingar av sjúkuni kunnu bara væntast meira sjónlig við tíðini.

Í umsóknini frá borgaranum, skrivað av avvarðandi, er upplýst, at borgarin orsakað av sjúkuni gerst alsamt meira dementur. Hann hevur ikki innlit í egna støðu, og hann er ikki førur fyri at taka sær av sær sjálvum.

Upplýst er eisini, at borgarin hevur eina sálarsjúku. Henda diagnosa hevur kortini ikki havt við sær, at borgarin hevur verið trupul at fáast við. Borgarin hevur ikki havt tilknýti til psykiatriska depilin síðan í 1990-árunum.

Í avgerðum stutt fyri og eftir ársskiftið 2016-17 (21.12.16 og 03.01.17) hevur Markamótsnevndin úttalað seg um markamótið millum, nær Almannaverkið eftir forsorgarlógini hevur ábyrgd av búplássi, og nær henda ábyrgd er kommunal eftir lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Nevndin vísti tá á, at tey røktarkrevjandi undir 67 ár, ið sum undantak kunnu fáa búpláss eftir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., eru borgarar við progressivum og degenererandi sjúkum sum Alzheimers og øðrum sløgum av demensi ella Sclerosu á seinni stigi. V.ø.o. sjúkur, ið eldri vanliga fáa, og sum í mun til tørvin seta sjúklingarnar, sum eru undir 67 ár, í líknandi støðu sum teir, ið eru yvir 67.

Nevndin skilmarkaði síðan henda bólk frá sjúklingum, ið hava eitt nú seinheilaskaða. Hesir seinastu eru vanliga í eini stabilari/permanentari støðu, og teir hava tørv á aðrari hjálp og stuðuli enn teir sjúklingarnir, ið alsamt gerast meira dementir. Markamótsnevndin helt hesar sum útgangsstøði vera ábyrgd hjá Almannaverkinum eftir forsorgarlógini.

Í mun til ítøkiliga málið heldur Markamótsnevndin, at borgarin hevur sjúku, ið liggur næst við og eigur at vera fevnd av § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hareftir ávísir borgarar undir 67 ár eru ábyrgd hjá kommunalu heimatænastuni.

Nevndin heftir seg við, at borgarin er dementur, sum positivt er nevnt í viðmerkingunum til § 14, stk. 2. Nevndin leggur eisini dent á, at sjúkan hjá borgaranum bara kann væntast at versna, og at talan tískil ikki er um sjúku, ið kann samanberast við hana, ið eitt nú seinheilaskadd hava.

Sálarliga støðan hjá borgaranum er ikki so álvarsom, at kravið í § 32 í forsorgarlógini um "týðandi sálarligt brek" er uppfylt, ið kundi ført við sær, at borgarin átti at verðið vístur til búpláss undir Almannaverkinum.

Niðurstøða

Markamótsnevndin metir at borgarin – í tann mun upptøkunevndin heldur hann vera nóg røktarkrevjandi til at fáa tilboð um búpláss – kemur undir ábyrgdarøkið hjá kommununi eftir § 14, stk. 2, í løgtingslóg nr. 121 frá 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Bárður Larsen (form.)

Ása Olsen

Katrin Danielsen